## ES fíggjar skeið hjá RG

Í november í fjør byrjaðu umleið 100 arbeiðsfólk hjá Royal Greenland eitt tvey ára skeið innan fiskivinnu. Skeiðið er lagt til rættis saman við Fiskeriindustri ATI í Maniitsoq og er fíggjað við pengum frá ES. Skeiðið er býtt sundur í átta partar og hevur til endamáls at bøta um teir fakligu førleikarnar. Paviâraq Heilmann, stjóri í Royal Greenland, sigur við KNR, at hann er fegin um møguleikan, sum arbeiðsfólkið hevur fingið, og hann væntar, at tað fer at koma øllum samfelagnum til góðar. Sambært einari avtalu millum Grønland og ES frá 2006 fekk Grønland 195 milliónir krónur til serligar útbúgvingar.

## Sterling-kreditorar fáa einki

Nú avtøkustjórin er liðugur at gera búgvið eftir flogfelagið Sterling upp, er úrslitið, at hvørki viðskiftafólk ella veitarar fáa eina krónu av tí, sum tey áttu til góðar hjá felagnum. Teir smápengarnar, sum eru eftir hjá kistubotninum, fáa starvsfólkini, skrivar Ritzau. Nógv fólk sótu sum Kánus, tá Sterling fór á húsagang í oktober í fjør, tí tey høvdu bílagt og goldið ferðaseðlar frá felagnum, og nú vísir tað seg, at tey fáa einki aftur. Avtøkustjórin vísir á, at fyrrverandi starvsfólk skulu hava sítt, áðrenn nakar av hinum kravánarunum fær nakað, og har er einki til hini, sigur hann við Ritzau.

# Serfrøðin er styrkin

**El-talvuvirkið í Gøtu hevur heilt frá byrjan serútbúgvið seg innan el-talvur. Men hóast virkið er hitt einasta av sínum slag í Føroyum, er kappingin beinhørð frá útlendskum kappingarneytum. – Vit hava serfrøðina á økinum, og tað er okkara styrki, sigur eigarin av El-talvuvirkinum í Gøtu, Eyðun Hansen**

ELVIRKI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*



*Eyðun Hansen er stjóri og eigari av El-talvuvirkinum í Gøtu*

Tað var rættiliga tíðliga greitt fyri Eyðun Hansen, at lívsleið hansara skuldi verða innan el-talvur.

– Eg fór í læru sum elektrikari hjá Jón Rasmussen á Strondum og varð útlærdur har. Nógv av arbeiðinum, sum lærumeistarin hevði, var í Gøtu. Hetta var miðskeiðis í 70-unum, og tá vóru rættiligar uppgangstíðir í Gøtu og nógv arbeiði her, sigur Eyðun Hansen.

Nógv sildaarbeiði var á virkinum hjá Haranga, og allir sildabátarnir komu á Gøtu tá at landa, í mun til í dag, nú teir leggja veiðina upp í Fuglafirði.

– Eg varð útlærdur í 1975, og helt fram sum sveinur hjá Jón Rasmussen í eina tíð. Tað vóru blomstrandi tíðir í Gøtu tá, sigur Eyðun Hansen.

Nakað seinni fór hann á skipasmiðjuna á Skála at arbeiða sum skipselektrikari, og helt fram har til 1979, tá hann fór yvir til Noregi at arbeiða.

– Hetta var eitt el-talvuvirki, og tað var meðan eg arbeiddi har, at tankin kom um at gera egið el-talvuvirki heima í Føroyum, sigur Eyðun Hansen.

Hann fór so niður til Danmarkar at taka installatørútbúgving, og heim aftur komin byrjaði hann sítt egna virki í 1983 – fyri góðum 25 árum síðani.

Hann miðaði fyrst og fremst móti vinnuliga marknaðinum, skipum og vinnuligum bygningum.

Tað gekk skjótt at fáa fótafesti hjá skiðasmiðjunum, bæði á Skála, í Havn og suðuri í Vági, har teir eisini smíðaðu skip tá.

– So vit hava leverað ógvuliga nógvar talvur til skip, sum eru bygd í Føroyum. Men eisini til teir mongu vinnuligu bygningarnar, sum vórðu bygdir í Føroyum í 80-unum og fram til í dag, hava vit leverað talvur til, sigur Eyðun Hansen.

Hetta umfatar eisini hotellir og aðrar stóran vinnuligar bygningar, eins væl og skúlar og aðrar almennar stovnar.

### Á føroyska marknaðinum

Eitt annað, sum El-talvuvirkið hevur fingist nógv við, er at levera neyðaggregatir til alskyns endamál.

- Vit bæði levera og seta upp og forbinda automatikkin til neyðaggregatir. Tað er til stovnar og feløg har tað er neyðugt, at skipanin koyrir, skuldi streymurin farið, sigur Eyðun Hansen.

Tað kann verða talan um Kringvarpið, Føroya Tele, Elektron og líknandi fyritøkur, har tað er avgerandi, at skipanin verður hildin í gongd.

Tá El-talvuvirkið kom á marknaðin í 1983, var tað eingin trupulleiki at fáa fyritøkurnar at taka ímóti virkinum.

– Tað var tikið væl ímóti okkum. Vit vóru jú ein føroysk fyritøka, sum kundi levera føroyskar skipanir, og tey allarflestu vildu stuðla undir, tá talan var um eina føroyska framleiðslu, sigur Eyðun Hansen.

Framman undan El-talvuvirkinum vóru allar eltalvur innfluttar, fyrst og fremst úr Danmark. Men føroyska virkið setti seg tó skjótt á meginpartin av marknaðinum.

– Kortini er kappingin ógvuliga hørð frá útlendsku fyritøkunum, og tað kann vera, at vit ikki hava verið nóg góðir at upplýst um, hvat vit kunnu levera, sigur Eyðun Hansen.

Hóast føroyska eltalvuvirkið situr á meginpartinum av marknaðinum, so er tað kortini ikki so, at teir fáa allar bíleggingarnar.

– Kappingin er knallhørð í dag, staðfestir Eyðun Hansen.

Tað er fyrst og fremst á føroyska marknaðinum, at El-talvuvirkið í Gøtu ger um seg.

– Vit hava verið við í onkrum verkætlanum uttanlands, fyrst og fremst innan skipabygging, men tá er tað sum oftast tí føroyingar á einhvønn hátt eru tengdir at viðkomandi verkætlan, sigur Eyðun Hansen.

### Fleiri bein at standa á

El-talvuvirkið vaks rættiliga skjótt, og tað gekk ikki long tíð, fyrr enn Eyðun Hansen hevði einar tríggjar, fýra mans aftrat sær.

- Nakrir teirra, sum arbeiða í fyritøkuni í dag, eru menn, sum eg arbeiddi saman við, meðan eg lærdi á Skála á eldeildini har. Teir blivu skjótt ein partur av